FISKIMÁLARÁÐIÐ

| Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu<br>Att.: Pál Weihe, stjóri<br>Sigmundargøta 5<br>P.O.Box 14<br>110 Tórshavn | **Fiskivinnustovan**<br>29. januar 2021<br>Mál: 20/00528-2<br>(at tilskila í svari)<br><br>Viðgjørt: JM/mn<br><br>Tygara skriv: 4. des. 2020 |
|---|---|

Avrit sent: Annbjørg Abrahamsen, Brúgv 4, 530 Fuglafjørður

**Játtanarskriv**

**til royndir/verkætlanir undir Fiskivinnuroyndum**

Víst verður til umsókn tygara til "Fiskivinnuroyndir" 2021 um stuðul til verkætlanina við heitinum:

**20/00528**
**Møði hjá føroyskum fiskimonnum, og hvussu møði ávirkar faturnarligu evnini hjá teimum - samanbering ímillum troytta og hvílda støðu hjá luttakarunum, umframt hvørjir faktorar eru við til at økja um møðina.**
**(Stytt: "Møði hjá føroyskum fiskimonnum")**

Endamálið við PhD-verkætlanini (stuðlinum):

Endamálið er at kanna munin millum, hvussu heilin virkar, tá fiskimann eru troyttir, og tá teir eru úthvíldir. Hetta tí fleiri kanningar av fiskimonnum vísa, at møði er ein trupulleiki innan økið og er størsti einkultfaktorurin, sum viðvirkar til vanlukkur. Umframt at kanna møðina sjálva, so er tilfar eisini samlað fyri at kanna, hvørjir faktorar eru við til at økja um møði hjá sjómonnum, herundir larmur, rull, svøvnur, arbeiðsnøgd/byrða og skipan av arbeiði.

Stuðul verður latin svarandi til 2 mánaðarlønir í smb. v. at umsøkjarin so kann gera sína PhD-ritgerð lidna. (Stuðul er fyrr veittur í 3 ár til somu verkætlan).

Liðugskrivingin av ritgerð er sett til at byrja 1. jan. 2021 og mett at enda 31. mars 2021 (3mdr)
Søkt verður um:

Kr. 113.589,- fyri 2021

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið hevur tann 25. jan. 2021 játtað at stuðla nevndu roynd/verk-ætlan við **75.726 kr. í 2021** (2 mánaðarlønir og einki annað).

Verkætlanin hevur fingið tillutað **eyðmerkið Mál 20/00582**. Hetta eyðmerkið skal fylgja við øllum samskifti við samskiparan ella Fiskimálaráðið.

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Á heimasíðuni hjá Fiskivinnugransking (sí www.fvg.fo) eru skjøl viðvíkjandi umbøn um útgjald og oyðublað til ávegisfrágreiðingar og aðrar vegleiðingar fyri samskiftið.

Fiskimálaráðið vil í næstum seta seg í samband við tykkum viðvíkjandi gerð av sáttmála um verkætlanina.

Eru spurningar í hesum sambandi, verða tit vinarliga biðin um at venda tykkum til samskiparan í fiskivinnugransking. Fiskimálaráðið og stýrisbólkurin fyri Fiskivinnuroyndum ynskja góða eydnu við verkætlanini.

Vinarliga

Jákup Mørkøre,
Fulltrúi og Samskipari í fiskivinnugransking
Tlf.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Havstovan<br>Att.: Eilif Gaard, stjóri<br>Nóatún 1<br>Postboks 3051<br>100 Tórshavn | **Fiskivinnustovan**<br>30. januar 2021<br>Mál: 20/00555-2<br>(at tilskila í svari)<br><br>Viðgjørt: JM/mn<br><br>Tygara skriv: 14. des. 2020 |

Avrit: Inga Kristiansen, PhD-lesandi, sama stað

**Játtanarskriv**

**til royndir/verkætlanir undir Fiskivinnuroyndum**

Víst verður til umsókn tygara til "Fiskivinnuroyndir" 2021 um stuðul til verkætlanina við heitinum:

**20/00555**

**Kanning av reyðæti, sum rennur úr Bankarennuni um veturin**
**(Stytt: "Reyðæti úr Bankarennuni")**

Endamálið og bakgrund fyri verkætlanini:
Í verkætlan hjá Havstovuni, sum Fiskivinnuroyndir stuðlaðu í 2017 og 2018, varð avdúkað, at um heystið og veturin streyma umleið 50 túsund tons av reyðæti um døgnið norður ígjøgnum tann djúpa partin av Bankarennuni. Samanlagt fyri heystið og veturin gevur hetta eini 8 milliónir tons av reyðæti. (Gaard og Sørensen, 2018, Gaard, 2020).
Hetta er partur av tí reyðætinum, sum er í vetrardvala í djúpum køldum sjógvi í Norskahavinum og sum verður tikið við tí sjónum, sum fer suðureftir í tí djúpa partinum av Hetlandsrennuni og síðan víðari norðureftir ígjøgnum tann djúpa partin av Bankarennuni (Mynd 1).




Mynd 1. Djúpa rákið av køldum sjógvi í Hetlands- og Bankarennuni

Havstovan hevur mælt Fiskimálaráðnum til eina veiðu á 1,5% av hesum reyðætinum, svarandi til 120.000 tons um árið. Men Havstovan ger eisini vart við, at neyðugt er við varsemi og at veiðan eigur at steðga ultimo januar. Fleiri kanningar eiga eisini at verða gjørdar av, um tað reyðætið, sum rekur út úr Bankarennuni, møguliga hevur týdning sum føði tætt við, har tað rekur út, tvs. í økinum norðan fyri

Føroyabanka. T.d. kann nevnast, at kalvi gýtir í útnyrðing av Føroyabanka á hávetri og eisini kann hugsast, at m.a. mesopelagisk fiskasløg eru á leiðini, sum taka burturav ætinum, áðrenn tað spjaðist. Vit vita tað ikki.

Í vinnuni er stórur áhugi fyri hesum fiskiskapi, men heilt natúrligt, so ivast fleiri. Bæði í vinnuni sjálvari, hjá myndugleikunum og millum almenningin annars er áhugi í at fáa meira at vita um møguligar vistfrøðiligar avleiðingar av veiðuni.
Fyrivarnið uppá 1,5% liggur tætt við tað, sum verður brúkt í Noregi. Men ikki er vist, at hetta er rætt í Føroyum og vit mugu tí vita meira um, hvat annars hevði hent við tí reyðætinum, sum verður veitt. Nakað av havfrøðiligum kanningum er gjørdar í økinum, men neyv vitan er ikki tøk. Og enn minni er vitanin um tað reyðætið, sum rekur út úr Bankarennuni um veturin.

- Verður t.d. ein partur av ætinum blandaður upp í sjógvin ella heldur alt fram vestureftir niðri í dýpunum?
- Fer tað í útnyrðing fram við hellingini á Íslandsrygginum ella spjaðist tað eisini í útsynning – ella bæði?
- Hvussu skjótt tynnist reyðætið út?
- Hvørjar hitabroytingar upplivir reyðætið í teimum ymiskum økjunum og hvussu ávirkar hetta ta lívfrøðiligu støðuna hjá hesum djórunum?

Hesar og aðrar viðkomandi spurningar vilja vit svara í hesum umfari. Tá vit vita tað, ber til at fokusera neyvari á týdningin av reyðætinum sum føði.
Havstovan hevur útgerðina til kanningina og ber kostnaðin fyri skipið og lønarkostnaðin fyri tær havfrøð-iligu analysurnar.

Royndin/verkætlanin er sett til at byrja 1. sep. 2021 og mett at enda 31. mars 2022 (7mdr)

Søkt verður um:

Kr. 217.500,- fyri 2021
Kr. 100.000,- fyri 2022

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið hevur tann 10. jan. 2020 játtað at stuðla nevndu roynd/verk-ætlan við **200.000 kr. í 2021 og 250.000 kr. í 2022**. Tó skal søkjast um framhald á hvørjum ári.

Verkætlanin hevur fingið tillutað **eyðmerkið Mál 20/00555**. Hetta eyðmerkið skal fylgja við øllum samskifti við samskiparan ella Fiskimálaráðið.

Á heimasíðuni hjá Fiskivinnugransking (sí www.fvg.fo) eru skjøl viðvíkjandi umbøn um útgjald og oyðublað til ávegisfrágreiðingar og aðrar vegleiðingar fyri samskiftið.

Fiskimálaráðið vil í næstum seta seg í samband við tykkum viðvíkjandi gerð av sáttmála um verkætlanina.

Eru spurningar í hesum sambandi, verða tit vinarliga biðin um at venda tykkum til samskiparan í fiskivinnugransking. Fiskimálaráðið og stýrisbólkurin fyri Fiskivinnuroyndum ynskja góða eydnu við verkætlanini.

Vinarliga

Jákup Mørkøre,
Fulltrúi og Samskipari í fiskivinnugransking
Tlf.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Havstovan<br>Att.: Eilif Gaard, stjóri<br>Nóatún 1<br>Postboks 3051<br>100 Tórshavn | **Fiskivinnustovan**<br>30. januar 2021<br>Mál: 20/00561-2<br>(at tilskila í svari)<br><br>Viðgjørt: JM/mn<br><br>Tygara skriv: 15. des. 2020 |

Avrit sent: Hannipoula Olsen, sama stað

**Játtanarskriv**

**til royndir/verkætlanir undir Fiskivinnuroyndum**

Víst verður til umsókn tygara til "Fiskivinnuroyndir" 2021 um stuðul til verkætlanina við heitinum:

**20/00561**

**Útbreiðsla, lívfrøði og fiskiskapur eftir reyðsprøku og tungu undir Føroyum**
**(Stytt: "Reyðsprøka og tunga")**

Endamál og bakgrund fyri verkætlanini:

Tunga og reyðsprøka eru tvey ymisk sløg av flatfiski, sum eru at finna á landgrunnunum í Norður-atlanshavinum, við Ísland, framvið norsku strondini, í Norðsjónum og í bretskum sjóøki. Harafturat er reyðsprøka við Suðurgrønland og eisini heilt suður til Marokko og inn í Miðjarahavið norður í Genovavíkina. Bæði reyðsprøka og tunga undir Føroyum vera roknað sum serføroyskir fiskastovnar. Úttbreiðslan fyri ávikavist reyðsprøku og tungu frá yvirlitstúrunum um summarið í 2020 vísir, at bæði sløgini eru aloftast á landgrunninum, har dýpið er grynri enn 200 m




**Mynd 1 – Útbreiðsla (kg/t) av reyðsprøku og tungu á yvirlitstúrinum síðsta summar.**

Bólkur 4T hevur saman við Faroe Islands Sustainable Fisheries eitt ynski um at fáa reyðsprøku og tungu MSC góðkenda og hevur heitt á Havstovuna um fáa neyðugar kanningar, m.a. stovnsmetingar, sum krevst til umsókn um MSC-góðkenning fyri fiskasløg.

Endamálið við verkætlanini er at økja um vitanina um útbreiðslu, lívfrøði og fiskiskap av reyðsprøku og tungu undir Føroyum við tí fyri eyga at gera eina stovnsmeting av nevndu fiskasløgunum, sum kann nýtast í eini framtíðar umsókn til MSC góðkenning.

Ætlanin er at byrja verkætlanina við at fáa eitt yvirlit yvir tøkt taltilfar. Hetta innber millum annað at endurskoða skipsdagbøkur og eftirkanna nytrusavn og líknandi. Samstundis verður eisini sýnistøka av tungu og reyðsprøku komandi ár og í 2022 og í 2023 at fáa tilvega meira neyvt og miðvíst taltilfar. Hetta inniber at taka longd, vekt, kruvdavekt, kyn og búningarstig av tungu og reyðsprøku. Harumframt vera nytrur tiknar til aldursgreining og magar vera útgreinaðir at kanna føðiviðurskiftir hjá reyðsprøku og tungu. Sýni verða tiknir umborð á Jákup Sverra á yvirlitstúrunum á landgrunninum og á Føroyabanka. Hetta dekkar alla útbreiðslu á landgrunninum og allar aldurbólkar, harímillum tilgongd. Eisini verða sýni tikin av landaðari veiðu í samstarv við Felagið Trolbátar, sum dekkar árstíðirbroytingar.

Royndin/verkætlanin er sett til at byrja 1. aug. 2021 og mett at enda 31. juli 2024 (36mdr)

Søkt verður um:

Kr. 615.500,- fyri 2021
Kr. 1.142.500,- fyri 2022
Kr. 1.142.500,- fyri 2023
Kr. 447.000- fyri 2024

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið hevur tann 10. jan. 2020 játtað at stuðla nevndu roynd/verkætlan við **400.000 kr. í 2021, 400.000 kr. í 2022, 400.000 kr. í 2023 og 400.000 kr. í 2024.** Tó skal søkjast um framhald á hvørjum ári.

Verkætlanin hevur fingið tillutað **eyðmerkið Mál 20/00561**. Hetta eyðmerkið skal fylgja við øllum samskifti við samskiparan ella Fiskimálaráðið.

Á heimasíðuni hjá Fiskivinnugransking (sí www.fvg.fo) eru skjøl viðvíkjandi umbøn um útgjald og oyðublað til ávegisfrágreiðingar og aðrar vegleiðingar fyri samskiftið.

Fiskimálaráðið vil í næstum seta seg í samband við tykkum viðvíkjandi gerð av sáttmála um verkætlanina.

Eru spurningar í hesum sambandi, verða tit vinarliga biðin um at venda tykkum til samskiparan í fiskivinnugransking. Fiskimálaráðið og stýrisbólkurin fyri Fiskivinnuroyndum ynskja góða eydnu við verkætlanini.

Vinarliga
Jákup Mørkøre,
Fulltrúi og Samskipari í fiskivinnugransking
Tlf.: 35 30 30; Fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Varðin Pelagic<br>Havnarlagið 11<br>800 Tvøroyri<br><br>Att.: Bogi Jacobsen, stjóri | **Fiskivinnustovan**<br>30. januar 2021<br>Mál: 20/00558-2<br>(at tilskila í svari)<br><br>Viðgjørt: JM/mn<br><br>Tygara skriv: 14. des. 2020 |

Avrit sent: Anniku Nolsøe, Í Húsgarði 8, 826 Trongisvágur

**Játtanarskriv**

**til royndir/verkætlanir undir Fiskivinnuroyndum**

Víst verður til umsókn tygara til "Fiskivinnuroyndir" 2021 um stuðul til verkætlanina við heitinum:

**20/00558**

**Makinskering av svartkjafti til surimiframleiðslu og aðrar svartkjaftaúrdráttir til matna (Stytt: "MS")**

Endamál og bakgrund fyri verkætlanini:
Varðin Pelagic hevur gjørt drúgvar kanningar tey seinastu árini fyri at finna loysnir til virðisøking av svartkjafti.

Fyrsta framleiðslustigið var heilfrysting av svartkjaft til matna (MYND 1). Hendan framleiðslan er komin væl áleiðis, og Varðin Pelagic selur rímuliga stórar nøgdir av heilfrystum svartkjaft til Ruslands, Afrika og Asia.




**MYND 1: Heildarætlan fyri virðisøking av svartkjafti á Varðin Pelagic**

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Tað er ein sannroynd at svartkjaftur er munandi truplari at virkað enn t.d. sild og makrel. Svartkjaftur er meira bleytur, skroypiligur og spillist skjótari, umframt at hann t.d. er ringur at flyta.

Størsta avbjóðingin í løtuni er, at maskinskeringin av fiskinum, við atliti til framleiðsluorku, verður sum ætla; tvs. klárar mann at skera fiskin nóg væl og nóg skjótt, soleiðis at kapasiteturin ikki verður ein fløskuhálsur. Harumframt at úrtøkan gerst so høg sum møguligt, og at sum minst av spilli stendst av skeringini (bleytur fiskur og smáur fiskur).

Varðin Pelagic hevur nú funnið ein samstarvspart í litavisku fyritøkuni Peruza, ið hevur royndir at virka smáan og bleytan fisk. Málið er at menna útgerð, sum kan levera kruvdan ella flaka-skornan svartkjaft við bestu úrtøku.

**Eyðmerkt vera hesi fokusøkir:**

- Automatisk rætningur av svartkjaftinum, soleiðis at høvdið altíð kemur fyrst
- Automatisk rætningur av svartkjaftinum, soleiðis at búkurin altíð kemur fyrst
- Kryvjing og flakaskering við maksimalari úrtøku.

Eitt hugskot til tøknimenning og úrdráttir kunnu vera sum vístar á Mynd 2 og Mynd 3 og sum dømi um kravspesifikasjónirnar (Talva I).



**MYND 2**: Hugskot til tøknimenning til skering av svartkjafti



**MYND 3**: Dømi um svarkjaftaurdráttir

**TALVA I:** Kravspesifikasjónir til kapasitet, operatørartal, neyvleika, fiskalongd, feilprosent og støddarskiljing

| Parameter | Autofeeder and 1 pocket-chain nobbing + belly cleaning + vision system |
|---|---|
| Capacity | 150 - 180 fish/minute |
| Operators needed | 1 per pocket –chain nobbing device |
| Accuracy of orientation in direction head/tail | Automatic operation 95%; employment of one operator adds additional 4 % reaching 99% |
| Fish length | 20 – 26 cm |
| Error percentage - damaged fish by wrong orientation | 3-5% |
| Grades of fish size | 20 – 22; 22 – 24; 24 - 26 |

Royndin/verkætlanin er sett til at byrja 1. jan. 2021 og mett at enda 31. des. 2023 (36mdr)

Søkt verður um:

Kr. 400.000,- fyri 2021
Kr. 400.000,- fyri 2022
Kr. 400.000,- fyri 2023

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið hevur tann 10. jan. 2020 játtað at stuðla nevndu roynd/verkætlan við **300.000 kr. í 2021, 300.000 kr. í 2022 og 300.000 kr. í 2023.** Tó skal søkjast um framhald á hvørjum ári.

Verkætlanin hevur fingið tillutað **eyðmerkið Mál 20/00558**. Hetta eyðmerkið skal fylgja við øllum samskifti við samskiparan ella Fiskimálaráðið.

Á heimasíðuni hjá Fiskivinnugransking (sí www.fvg.fo) eru skjøl viðvíkjandi umbøn um útgjald og oyðublað til ávegisfrágreiðingar og aðrar vegleiðingar fyri samskiftið.

Fiskimálaráðið vil í næstum seta seg í samband við tykkum viðvíkjandi gerð av sáttmála um verkætlanina.

Eru spurningar í hesum sambandi, verða tit vinarliga biðin um at venda tykkum til samskiparan í fiskivinnugransking. Fiskimálaráðið og stýrisbólkurin fyri Fiskivinnuroyndum ynskja góða eydnu við verkætlanini.

Vinarliga

Jákup Mørkøre,
Fulltrúi og Samskipari í fiskivinnugransking
Tlf.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Aksel Dahl-Olsen<br>Mækjugøta 4<br>100 Tórshavn | **Fiskivinnustovan**<br>30. januar 2021<br>Mál: 20/00562-4<br>(at tilskila í svari)<br><br>Viðgjørt: JM/mn<br><br>Tygara skriv: 15. des. 2020 |

Avrit sent: Eyðin Djurhuus, Gortrugøta 1, 188 Hoyvík

**Játtanarskriv**

**til royndir/verkætlanir undir Fiskivinnuroyndum**

Víst verður til umsókn tygara til "Fiskivinnuroyndir" 2021 um stuðul til verkætlanina við heitinum:

**20/00562**

**Royndarfiskiskapur eftir jomfrúhummara og trælsrass við botntroli uttanfyri seks fjórðingar**
**(Stytt: "Royndarfiskiskapur eftir jomfrúhummara og trælsrass")**

Endamál og bakgrund fyri verkætlanini:

- At kanna, um rakstrarverdar nøgdir av jomfrúhummara og/ella trælsrass kunnu fiskast undir Føroyum, uttanfyri 6 fj. - við troli.
- At kanna, um teknaða trolristin (tekning innsend) riggar til at fiska jomfrúhummara og/ella trælsrass við smámeskaposa til hummara og skilja restina frá.
- At niðurfrysta og senda 2 tons av trælsrass til Íslendskan framleiðara, hetta fyri at vita, hvussu gamalt trælsrass kann verða, áðrenn tað má frystast. Tað vil siga, um man kann royna, 1, 2, 3 dagar osfr., áðrenn man má inn at landa og fáa trælsrassi fryst, uttan at tað gongur út yvir góðskuna.

Royndin/verkætlanin er sett til at byrja 1. jan. 2021 og mett at enda 31. des. 2021 (12mdr).

Søkt verður um:

Kr. 338.328,- fyri 2021

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið hevur tann 10. jan. 2020 játtað at stuðla nevndu roynd/verk-ætlan við **338.328 kr. í 2021.**

Verkætlanin hevur fingið tillutað **eyðmerkið Mál 20/00562**. Hetta eyðmerkið skal fylgja við øllum samskifti við samskiparan ella Fiskimálaráðið.

Á heimasíðuni hjá Fiskivinnugransking (sí www.fvg.fo) eru skjøl viðvíkjandi umbøn um útgjald og oyðublað til ávegisfrágreiðingar og aðrar vegleiðingar fyri samskiftið.

Fiskimálaráðið vil í næstum seta seg í samband við tykkum viðvíkjandi gerð av sáttmála um verkætlanina.

Eru spurningar í hesum sambandi, verða tit vinarliga biðin um at venda tykkum til samskiparan í fiskivinnugransking. Fiskimálaráðið og stýrisbólkurin fyri Fiskivinnuroyndum ynskja góða eydnu við verkætlanini.

Vinarliga

Jákup Mørkøre,
Fulltrúi og Samskipari í fiskivinnugransking
Tlf.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Jóannes Eliasen<br>Á Bakka 13<br>520 Leirvík | **Fiskivinnustovan**<br>30. januar 2021<br>Mál: 20/00563-2<br>(at tilskila í svari)<br><br>Viðgjørt: JM/mn<br><br>Tygara skriv: 15. des. 2020 |

**Játtanarskriv**

**til royndir/verkætlanir undir Fiskivinnuroyndum**

Víst verður til umsókn tygara til "Fiskivinnuroyndir" 2021 um stuðul til verkætlanina við heitinum:

**20/00563**

**Hvussu nógv verður fiskað av gággu undir Føroyum**
**(Stytt: Gágga undir Føroyum)**

Endamál og bakgrund fyri verkætlanini:

At finna fram til hvussu nógv gágga verður fiskað undir Føroyum árliga og á hvørjum leiðum.
Gággan verður fiskað til agn, men spurningurin er frammi av og á um at menna gággufiskiskapin til eisini at umfata fiskiskap eftir gággu til matna.
Tað er av stórum týdningi fyri okkara myndugleikar, at teir hava eina neyva mynd av gággufiskskapinum, ið nú er undir Føroyum, tí henda vitan kann hjálpa myndugleikunum til at staðfesta og áseta, hvat er ein burðardygg veiða av gággu undir Føroyum kann verða.

Verkætlanin gongur út uppá:

- At koma í samband við allar gággufiskararnar í Føroyum
    - Hetta kann gerast
        - við at vitja gággufiskararnar
        - við at tala í telefon við gággufiskararnar
        - við teldusamskifti við gággufiskararnar

- Fáa at vita frá gággufiskarunum
    - Hvussu nógva gággu teir fiska árliga
    - Hvar teir fiska gágguna og hvussu nógv á hvørjum leiðum
    - Hvussu fiskiskapurin fordeilir eg gjøgnum árið – hvussu nógv teir fiska hvønn mánaða
    - Hvussu nógvar rúsur teir nýta í fiskiskapinum

- Verkætlanin inniber tí
    - Nokkso nógva ferðing
    - At onkur landsstovnar møguliga verður spurdur til ráðs
    - Møguligt arbeiði har treiskni og tolsemi er neyðugt, um tað skuldi hent, at onkrir gággufiskarar treyðugt vilja geva upplýsingar um teirra gággufiskskap frá sær

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Royndin/verkætlanin er sett til at byrja 1. jan. 2021 og mett at enda 31. des. 2021 (12mdr).

Søkt verður um:

Kr. 150.000,- fyri 2021

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið hevur tann 10. jan. 2020 játtað at stuðla nevndu roynd/verkætlan við **150.000 kr. í 2021.**

Verkætlanin hevur fingið tillutað **eyðmerkið Mál 20/00563**. Hetta eyðmerkið skal fylgja við øllum samskifti við samskiparan ella Fiskimálaráðið.

Á heimasíðuni hjá Fiskivinnugransking (sí www.fvg.fo) eru skjøl viðvíkjandi umbøn um útgjald og oyðublað til ávegisfrágreiðingar og aðrar vegleiðingar fyri samskiftið.

Fiskimálaráðið vil í næstum seta seg í samband við tykkum viðvíkjandi gerð av sáttmála um verkætlanina.

Eru spurningar í hesum sambandi, verða tit vinarliga biðin um at venda tykkum til samskiparan í fiskivinnugransking. Fiskimálaráðið og stýrisbólkurin fyri Fiskivinnuroyndum ynskja góða eydnu við verkætlanini.

Vinarliga

Jákup Mørkøre,
Fulltrúi og Samskipari í fiskivinnugransking
Tlf.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

| Vónin Ltd.<br>Bakkavegur 22<br>530 Fuglafjørður<br><br>Att.: Hjalmar Hentze Petersen, stjóri | **Fiskivinnustovan**<br>30. januar 2021<br>Mál: 20/00565-4<br>(at tilskila í svari)<br><br>Viðgjørt: JM/mn<br><br>Tygara skriv: 15-17.des.2020 |
|---|---|

Avrit sent: Atli Petersen, søluleiðari, Mørkin 26, 530 Fuglafjørður

**Játtanarskriv**

**til royndir/verkætlanir undir Fiskivinnuroyndum**

Víst verður til umsókn tygara til "Fiskivinnuroyndir" 2021 um stuðul til verkætlanina við heitinum:

**20/00565**

**1728 mtr makreltrol, har bæði vengur og breidlar ganga saman fram til trollemmarnar (Stytt: "Makreltrol uttan breidlar"**

Endamál og bakgrund fyri verkætlanini:
Í trolfiskiskapinum verður tað sagt, at breidlarnir reka eitt sindur. Í samskiftinum millum okkara kundar og okkum er ofta í hesum samanhanginum ofta verið spurt, um tað er møguligt at fáa fylt breidlarnar upp við neti fyri at vita um tað hevur nakra ávirkan á t.d. í makrelveiðini.
Vónin hevur gjørt eitt uppskot útfrá hesum fyrispurningum og meta at vit hava eina góða loysn til makrelin.
Endamálið er fáa greiðu á, hvørja ávirkan (um nakra) tað hevur at fylla breidlarnar upp við neti, tá tað kemur til makrelin. Við hesum fáa vit nývitan innan hetta økið. Eisini menna vit eina vøru og talan er eisini um effektivisering í trolfiskiskapinum.
Ætlanin er at gera eitt modeltrol og tað er fyri at royna tað av í royndarbrunni. Hetta verður gjørt fyri at síggja, hvussu tað stendur úti í vatninum, har man so hevur møguleika at gera nakrar tillagingar.
Royndirnar verða bert gjørdar í makrelveiðini og tí mugu vit bíða til einaferð í summar við sjálvt royndunum.

Royndin/verkætlanin er sett til at byrja 1. jan. 2021 og mett at enda 31. okt. 2021 (10mdr)

Søkt verður um:

Kr. 488.000,- fyri 2021

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið hevur tann 10. jan. 2020 játtað at stuðla nevndu roynd/verkætlan við **400.000 kr. í 2021.**

Verkætlanin hevur fingið tillutað **eyðmerkið Mál 20/00565**. Hetta eyðmerkið skal fylgja við øllum samskifti við samskiparan ella Fiskimálaráðið.

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Á heimasíðuni hjá Fiskivinnugransking (sí www.fvg.fo) eru skjøl viðvíkjandi umbøn um útgjald og oyðublað til ávegisfrágreiðingar og aðrar vegleiðingar fyri samskiftið.

Fiskimálaráðið vil í næstum seta seg í samband við tykkum viðvíkjandi gerð av sáttmála um verkætlanina.

Eru spurningar í hesum sambandi, verða tit vinarliga biðin um at venda tykkum til samskiparan í fiskivinnugransking. Fiskimálaráðið og stýrisbólkurin fyri Fiskivinnuroyndum ynskja góða eydnu við verkætlanini.

Vinarliga

Jákup Mørkøre,
Fulltrúi og Samskipari í fiskivinnugransking
Tlf.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Mót Sp/f<br>Kollshjallar 7<br>470 Eiði<br><br>Att.: Jógvan í Skorini, stjóri | **Fiskivinnustovan**<br>30. januar 2021<br>Mál: 20/00568-3<br>(at tilskila í svari)<br><br>Viðgjørt: JM/mn<br><br>Tygara skriv: 15-16.des.2020 |

**Játtanarskriv**

**til royndir/verkætlanir undir Fiskivinnuroyndum**

Víst verður til umsókn tygara til "Fiskivinnuroyndir" 2021 um stuðul til verkætlanina við heitinum:

**20/00568**

**Menning av reiðskapi og tøkni til vinnuligan fiskiskap eftir reyðæti í Bankarennuni (Stytt: "Fiskiskapur eftir reyðæti í Bankarennuni")**

Endamálið og bakgrund fyri verkætlanini:
Grundin til at vit eru farnir í gongd við hesa verkætlan, er tann at Sp/f Mót, og Havstovan metir at tað møguliga kann lata seg gera at troyta eitt higartil ótroytt tilfeingið í føroyskum sjógvi, nevniliga reyðæti.
Við dagsins prísum, kann reyðæti í føroyskum sjógvi fáa størri virið enn øll føroyska fiskivinnan samanlagt. Tí er hetta sera áhugavert tilfeingið fyri Føroyar.

Sp/f Mót byrjaði fyrireikandi arbeiði av einum møguligum reyðætisævintýri í føroyskum sjógvi í 2017. Vit settu okkum á heysti í 2017 í samband við Calanus A/S, sum er einasta felag í heiminum sum hevur stórvegis royndir innan reyðætisfiskiskap. Vit hava fingið eina samstarvs avtalu við Calanus A/S, og P/F Næraberg. Í stuttum snýr avtalan seg um at vit (Sp/f Mót, og P/F Næraberg) fáa vitan frá teimum, harímóti vit selja teimum rávøru.

Vitanin um fiskiskap eftir reyðæti í Bankarennuni er av góðum grundun sera avmarkað, í og við at sera fáar kanningar eru gjørdar. Tó metir mann at í havstreyminum í rennuni, rennur millum 1-2 kg/m2 ígjøgnum um tíman, um veturin. Hetta skuldi givið okkum nóg stórar nøgdir til at ment eitt vinnuligt fiskaríð eftir reyðæti.

Stórsti, og meir ella minni eisini einasti spurningurin sum vit skulu fáa svar uppá við hesi verkætlan er: Hvussu fáa vit fatur á reyðætinum í Bankarennuni?

Peningurin sum fæst frá FVR skal brúkast til at menna reiðskap til at fiska reyðæti. Vit koma at fíggja skiparaksturin sjálvir.

Høvuðsendamálið við verkætlanini er at kunna byrja effektivan fiskiskap eftir reyðæti í Føroyum. Fáa vit hetta at rigga, fær Føroya land eitt ovurhondsstórt tilfeingið at troyta.



Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Ætlanin er at menna/finna:

- Holla vitan innan fiskiskap eftir reyðæti í Bankarennuni.
- Trol ella evt annan útbúna til reyðætisfiskiskap
- Pumpuskipan í samband við reyðætisfiskiskap.
    - Her verður hugsað um pumpuskipan av botnið og upp og um vanliga pumpuskipan úr trolinum umborð á skip.
- Fáa kortlagt miðsavnanina av reyðæti í Bankarennuni
- Fáa greitt yvirlit yvir hvørjari hæddarkurvu tað loysir seg at fiska í bankarennuni.
    - Her verður serliga hugsað um streymstyrki í mun til gjøgnumstreyming í trolinum.

Menna hagreiðingina av reyðæti umborð á skipi og á landi.

Royndin/verkætlanin er sett til at byrja 1. jan. 2021 og mett at enda 31. des. 2023 (36mdr)

Søkt verður um:

Kr. 500.000,- fyri 2021
Kr. 500.000,- fyri 2022
Kr. 500.000,- fyri 2023

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið hevur tann 10. jan. 2020 játtað at stuðla nevndu roynd/verkætlan við **400.000 kr. í 2021, 300.000 kr. í 2022 og 300.000 kr. í 2023.** Tó skal søkjast um framhald á hvørjum ári.

Verkætlanin hevur fingið tillutað **eyðmerkið Mál 20/00568**. Hetta eyðmerkið skal fylgja við øllum samskifti við samskiparan ella Fiskimálaráðið.

Á heimasíðuni hjá Fiskivinnugransking (sí www.fvg.fo) eru skjøl viðvíkjandi umbøn um útgjald og oyðublað til ávegisfrágreiðingar og aðrar vegleiðingar fyri samskiftið.

Fiskimálaráðið vil í næstum seta seg í samband við tykkum viðvíkjandi gerð av sáttmála um verkætlanina.

Eru spurningar í hesum sambandi, verða tit vinarliga biðin um at venda tykkum til samskiparan í fiskivinnugransking. Fiskimálaráðið og stýrisbólkurin fyri Fiskivinnuroyndum ynskja góða eydnu við verkætlanini.

Vinarliga

Jákup Mørkøre,
Fulltrúi og Samskipari í fiskivinnugransking
Tlf.: 35 30 30
fartel.: 55 32 48
t-post: jakupmo@fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

| | |
|---|---|
| Petur Larsen P/F<br>Bakkavegur 8<br>680 Fuglafjørður<br><br>Att.: Rógvi Róin, stjóri | **Fiskivinnustovan**<br>30. januar 2021<br>Mál: 20/00571-2<br>(at tilskila í svari)<br><br>Viðgjørt: JM/mn<br><br>Tygara skriv:15. des. 2020 |

Avrit sent: Johnny Klein Olsen, Dalastígur 1, 100 Tórshavn

**Játtanarskriv**

**til royndir/verkætlanir undir Fiskivinnuroyndum**

Víst verður til umsókn tygara til "Fiskivinnuroyndir" 2021 um stuðul til verkætlanina við heitinum:

**20/00571**

**Påmonteringssæt til udskæring af kraveben på fisk**
**(Stytt: "Udskæring af kraveben")**

Endamál og bakgrund fyri verkætlanini:
